# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 18.06.2026 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 38/26 | 26/00232-4 | Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, altan/útigólv, matr. nr. 67 128ac, Leirvík | 2 |
| 39/26 | 26/00256-3 | Umsókn um loyvi at keypa part av matr. nr. 13e GG (at leggja aftrat 13ø) | 3 |
| 40/26 | 26/00284-2 | Savnadypp – matr. nr. 169a í Leirvík | 5 |
| 41/26 | 26/00277-1 | 26/00277 - Frágreiðing og tilmæli - Frítíðarskúlin – skúrar – matr. nr. 128d í Leirvík | 6 |
| 42/26 | 26/00287-3 | Marknaumskipan av matr. 169a á havnalagnum í Leirvík | 7 |

**Til viðgerð:**

## 38/26 Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, altan/útigólv, matr. nr. 67 128ac, Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 10.06.2026 | 20/26 | 26/00232-4 |
| 2 Býráðið | 18.06.2026 | 38/26 | 26/00232-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn, dagfest 23. apríl 2026, um byggiloyvi til altanir.<br><br>Søkt verður um at byggja tvær altanir á matr. nr. 128ac í Leirvík. Onnur altanin verður staðsett í mark, meðan hin røkkur longur út enn 2,5 metrar frá bygninginum.<br><br>Málið hevur verið sent til grannahoyringar hjá eigarunum av matr. nr. 128ad og 128p. Ongar viðmerkingar eru innkomnar í sambandi við hoyringina. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at geva frávik til altanirnar og geva byggiloyvi í samsvari við umsóknina. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 10. juni 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 18. juni 2026**

## 39/26 Umsókn um loyvi at keypa part av matr. nr. 13e GG (at leggja aftrat 13ø)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 10.06.2026 | 19/26 | 26/00256-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 15.06.2026 | 30/26 | 26/00256-3 |
| 3 Býráðið | 18.06.2026 | 39/26 | 26/00256-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn, dagfest 15. mai 2026, um keyp av parti av matr. nr. 13e við Gøtugjógv.

Søkt verður um loyvi at keypa umleið 50 fermetrar av matr. nr. 13e sum ískoytisstykki til matr. nr. 13ø við Gøtugjógv.

**Lógir og ásetingar:**

Sambært kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn kann kommunan í ávísum førum selja fastogn uttan alment útboð.

**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á ella
4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.

*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022. §.17 stk.2. geva undantaksloyvi til góðkendu byggisamtyktina.

*Stk. 2.* [1)] Verður tað í kommunustýrisins ummæli eftir § 20 ella á annan hátt upplýst, at tað við sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara reglunum í:

a) lóggávuni um byggi- og brunaviðurskifti,
b) eini góðkendari byggisamtykt ella býarskipan, ella
c) lóggávuni annars, kann sundurbýtið ikki verða góðkent uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.

**Upplýsingar frá umsitingini:**

| |
|---|
| Parturin av matr. nr. 13e, sum umsóknin fevnir um, liggur innan fyri B1-øki sambært byggisamtyktini. B1-øki er ætlað til alternativa íbúðar- og húsabygging.<br><br>Sambært galdandi reglum hevur býráðið heimild at selja kommunalt ognarøki uttan alment útboð, tá talan er um øki undir 300 fermetrar. Eisini hevur býráðið heimild at veita neyðug frávik frá byggisamtyktini við at hendan verður broytt eftirfylgjandi.<br><br>**Skjøl:**<br>• Umsókn um víðkan av grundstykki 13ø við Gøtugjógv |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til selja part av matr. nr. 13e við Gøtugjóv svarandi til 50 fermetrar, og at geva frávik at broyta byggisamtyktina eftirfylgjandi. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 10. juni 2026</u>**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Fíggjarnevnd 15. juni 2026</u>**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**<u>Býráðið 18. juni 2026</u>**

## 40/26 Savnadypp – matr. nr. 169a í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 09.06.2026 | 3/26 | 26/00284-2 |
| 2 Býráðið | 18.06.2026 | 40/26 | 26/00284-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 15.06.2026 | 32/26 | 26/00284-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá Savnadypp um loyvi at nýta part av matr. nr. 169a í Leirvík til virksemi teirra.<br><br>Søkt verður um loyvi at seta upp eina sauna við plássi til umleið 20 persónar umframt hitapottar uttanfyri. Neyðug streymveiting verður fíggjað av umsøkjaranum.<br><br>Leigan fyri økið verður ásett til 500 kr. um mánaðin. Umsøkjarin ynskir at taka økið í nýtslu frá 1. juli 2026, og at avtalan verður galdandi í tvey ár.<br><br>Økið, sum søkt verður um at nýta, er pirurin við síðuna av frítíðarhúsinum, sambært viðfestum telduposti. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at geva saunadypp loyvi at verða á økinum og at gera sáttmála við teir. |

**Vinnunevndin 09. juni 2026**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 15. juni 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

**Býráðið 18. juni 2026**

## 41/26 26/00277 - Frágreiðing og tilmæli - Frítíðarskúlin – skúrar – matr. nr. 128d í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.06.2026 | 15/26 | 26/00277-1 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 10.06.2026 | 21/26 | 26/00277-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 15.06.2026 | 31/26 | 26/00277-1 |
| 4 Býráðið | 18.06.2026 | 41/26 | 26/00277-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í vernandi løtu er Frítíðarheimið Gásamýri normeraður til 100 børn. Seinastu árini hevur talið av børnum ligið um tey 100 børnini onkuntíð upp í 105 børn. Sambært leiðaranum á Frítíðarheiminum er hølisumstøðurnar ikki egnaðar til at húsa yvir 100 børnum. Hetta er roynt undanfarin ár, men er hetta ikki nakað, sum vit kunnu bjóða børnum og starvsfólkum.<br><br>Eftir summarferiuna kemur talið av børnum at verða 107 børn, og hevur leiðarin gjørt kommununi greitt, at hetta kunnu tey ikki liva við undir verandi hølisviðurskiftum.<br><br>Umsitingin hevur kanna loysnir saman við leiðsluni og starvsfólkum á Frítíðarheiminum og eru komin fram til, at besta loysnir er at seta mobilar lonir/skúrar á parkeringsøkið sunnanfyri Frítíðarheimið.<br><br>Eysturkommuna hevur fingið tilboð um leigu og keyp av lonum/skúrum, og ein samlað kostnaðarmeting fyriliggur. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Eingin peningur er avsettur á Fíggjarætlanini fyri 2026 til endamálið, og skal peningur játtast til endamálið um hetta skal gerast veruleiki. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

### Trivnaðarnevndin 10. juni 2026
Mælt verður til at arbeiða víðari við keyp av skúrum sambært meting av kostnaði og tekningum í málslýsingini.

### Byggi - og býarskipanarnevnd 10. juni 2026
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at kanna onnur hølir at leiga í grannalagnum.

**Fíggjarnevnd 15. juni 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini

**Býráðið 18. juni 2026**

## 42/26 Marknaumskipan av matr. 169a á havnalagnum í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 18.06.2026 | 42/26 | 26/00287-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur boðið grundøkini á matr. nr. 169a við Lugarið í Leirvík út til leigu.<br><br>Býráðið samtykti á fundi 27. apríl 2023 at fremja verkætlanina. Grundøkini eru síðani boðin út, og nú skulu leigusáttmálar gerast við leigararnar. Í hesum sambandi er neyðugt at sundurbýta økini, soleiðis at hvør eind fær sítt egna matrikulnummar.<br><br>**Skjøl:**<br>• Støðumynd<br>• Uppskot til sundurbýti av matr. nr. 169a í Leirvík. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at fremja sundurbýtið. |

**Býráðið 18. juni 2026**

fundurin lokin

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen